FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

**Leiðslufundur 12. januar 2016**

| | |
|---|---|
| Heiti: | Leiðslufundur |
| Til staðar á fundinum vóru: | Sigurð í Jákupsstovu (SíJ), Malan Marnersdóttir (MM), Hans Pauli Joensen (HPS) og Jørgen Meitilberg (JM) |
| Skrivað hevur: | JM |
| Fundartíð: | Týsdagur, 12. januar 2016 |
| Fundarstað: | SSS |

**Mál til støðutakan:**

**Mál til umrøðu:**

- **Arbeiðstíð hjá vísindastarvsfólkum**

Uppskot til notat um arbeiðstíð hjá vísindastarvsfólkum varð viðgjørt. Næsta stig er at senda uppskotið til viðmerkingar á deildunum.

- **Samstarv við DTU um geo-magnetiska støð í Suðuroy**

Fyrispurningur er komin frá DTU-space um at stovnseta eina geo-magnetiska støð í Suðuroy. Setrið er áhugað í at menna samstarvið við DTU. Dekanurin og rektarin taka málið upp við umboð fyri Náttúruvísindadeildina, síðani verður málið tikið upp á fundi við DTU tann 19. januar 2016.

- **Viðurkenning av Fróðskaparsetrinum**

Tað kemur javnan fyri, at studentar spyrja eftir altjóða góðkenning av Fróðskaparsetrinum í sambandi við víðari lestur uttanlands. Tær góðkenningar sum fyriliggja eru savnaðar í journalini undir máltalinum 16/00001.

- **The Nordic list project: observer members from the Faroe Islands and Greenland**

Setrið hevur fingið eina áheitan frá Granskingarráðnum um at velja eygleiðara í verkætlanina "The Nordic List" hvørs endamál er at gera eina felags útgávu skrá fyri norðurlondini. MM avgreiðir málið.

- **Hjánám í støddfrøði**

Uppskot til útbúgvingarprofil varð lagt fram. Uppskotið skal dagførast nakað, serliga skulu ECTS ásetingarnar eftirkannast. Útbúgvingarprofilurin verður sendur Mentamálaráðnum til góðkenningar skjótast til ber.

**Kunningarmál:**

- Jógvan í Lon Jacobsen hevur professarafyrilestur tann 5. februar 2016.

- Samansetingin í kampusbólkinum, sum varð settur av MMR herfyri, varð umrødd. Talan er í fyrsta umfari um ein samskipanarbólk, næsta stig er at inndraga starvsfólk.

- Janus Jensen samskiftir við Siv um masterútbúgvingina í vegleiðing. Bíðað verður eftir endaligari avgerð viðvíkjandi vegleiðaratímum í sambandi við masterritgerð.

**Ymiskt:**